LØGMANSSKRIVSTOVAN

Dagfesting:	28. mars 2023
Mál nr.:	23/05080
Málsviðgjørt:	SR/
Ummælistíð:	08.03.2023 – 15.03.2023
Eftirkannað:	17. mars 2023

Uppskot til

Løgtingslóg
um
ókeypis at avhenda ymiskt tilfar til P/F Suðuroyartunnilin

§ 1. Landsstýrinum er heimilað ókeypis at avhenda til P/F Suðuroyartunnilin tað verklagsarbeiði, allar forkanningar og annað tilfar, ið Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlanina og aðrar. Sama ger seg galdandi fyri slíkt tilfar, sum Landsverk hevur útvegað sær frá Jarðfeingi, Tjóðsavninum, Umhvørvisstovuni ella øðrum, ella sum nevndu stovnar hava um hendi. Slík avhending hevur ikki skattligar avleiðingar við sær fyri felagið.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
P/F Suðuroyartunnilin er nú farin undir tær innleiðandi kanningarnar, sum skulu verða grundarlag fyri støðutakanini fyri, hvussu arbeiðast skal víðari við málinum um at bora ein Suðuroyartunnil.

Í hesum sambandi hevur tað týdning hjá partafelagnum at fáa hendur á øllum relevantum tøkum tilfari, sum tað almenna hevur um verkætlanina.

1.2. Galdandi lóggáva
Tilfar sum hevur eitt peningaligt virði, hevur hitt almenna ikki heimild at lata ókeypis til løgfrøðiligar eindir, sum eru leysar av vanligu landsskipanini, eitt nú partafeløg. Hetta hóast tað, at tað almenna eigur allan partapeningin.

Tí hevur í higartil galdandi tunnilsætlanum verið serlig heimild fyri hesum:
- § 3 í Løgtingslóg nr. 6 frá 8. februar 2000 um fast samband um Vestmannasund
- § 4 í Løgtingslóg nr. 30 frá 14. apríl 2014 um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 6. mai 2016

Norðoyatunnilin hevði onga heimild av hesum slagi.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at geva neyðuga lógarheimild fyri at útflýggja alt neyðugt alment tilfar til P/F Suðuroyartunnilin.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Landsstýrið fær heimild at útflýggja kanningartilfar ókeypis til P/F Suðuroyartunnilin.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er sent til ummælis hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Jarðfeingi, Suðuroyartunlinum P/F, Landsverki, Tjóðsavninum og Umhvørvisstovuni.

Ummæli eru innkomin frá Jarðfeingi, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum og Landsverk. Tey eru hjáløgd.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Avleiðingarnar eru nærum ongar. Útveganin av tilfarinum er goldin. Peningaliga virðið gleppur ikki landinum av hondum. Har tað áður var ein landsstovnur, sum átti tilfarið, so er tað nú eitt partafelag, sum landið eigur, sum fær tilfarið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Nakað av umsitingarligum arbeiði stendst hjá nevndu landsstovnum at finna fram og at útflýggja umrødda tilfarið.
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) Hoyvíkssáttmálin
Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS
Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

2.9. Markaforðingar

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Ja, landsstyrið fær heimildir at útflýggja tilfar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Í uppskotinum til grein 1 verður staðfest, at felagið kostnaðarfrítt kann fáa tað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við verkætlanirnar, uttan at hetta fær skattligar avleiðingar fyri felagið. Heimildin fevnir eisini um tilfar, sum Landsverk hevur framleitt til aðrar líknandi verkætlanir, harundir Vága-, Norðoya- Eystur- og Sandoyartunnilin, um hetta annars tænir endamálinum í lógaruppskotinum. Somuleiðis kann P/F Suðuroyartunnilin ókeypis fáa alt tilfar, sum Landsverk hevur fingið frá Jarðgfeingi, Tjóðsavninum ella Umhvørvisstovuni, ella sum nevndu stovnar hava í hendi annars, sum er av týdningi fyri kanningararbeiðið viðvíkjandi Suðuroyartunlinum.

Felagið kann eisini keypa forkanningar og annað tilfar, ið privat feløg hava framleitt ella eiga, og sum viðkoma verkætlanini.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Skotið verður upp, at løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmansskrivstovan, 28. mars 2023

Aksel V. Johannesen
løgmaður

/ Sjúrður Rasmussen kst.

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Jarðfeingi 10.03.2023 av uppskoti til løgtingslóg um ókeypis at avhenda ymiskt tilfar til P/F Suðuroyartunnilin.
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum 10.03.2023 av uppskoti til løgtingslóg um ókeypis at avhenda ymiskt tilfar til P/F Suðuroyartunnilin.
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Landsverki 15.03.2023 av uppskoti til løgtingslóg um ókeypis at avhenda ymiskt tilfar til P.F Suðuroyartunnilin.